# Almannamálaráðið

Dagfesting: 02 november 2020
Mál nr.: 20/00828
Málsviðgjørt: BÁT

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br>Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 13. desember 2019, verða gjørdar hesar broytingar: |
| | **1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:<br>"Løgtingslóg um áseting av almannaveitingum" |
| **§ 1**<br>Henda lóg um áseting og javning av almannaveitingum er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 og 7 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne". | **2.** § 1 verður orðað soleiðis:<br>"Henda lóg um áseting av almannaveitingum er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 og 7 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne"." |
| **§ 2**<br>Almannaveitingar sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. og løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. | **3.** § 2, 1. pkt. verður orða soleiðis:<br>Almannaveitingar sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. og løgtingslóg um |

verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

**§ 3**
Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, upphæddirnar til uppihaldshjálp, umframt frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum eru:

1) Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.:

| | Byrja narár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 2020 | 46.548,00 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 2020 | 36.276,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 2014 | 72.360,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 2014 | 57.492,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk – fødd áðrenn 1. januar 1953 | 2016 | 45.252,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk – fødd aftaná 31. desember 1952 | 2020 | 57.348,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør – fødd áðrenn 1. januar 1953 | 2016 | 36.372,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør – fødd aftaná 31. desember 1952 | 2020 | 42.444,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 2018 | 62.184,00 |

**4.** Í § 3 verða sum nr. 4 og 5 sett:

"4) Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur:

| | Byrjan arár | Kr. |
|---|---|---|
| Hægsta uppihaldsveiting | 2020 | 18.552 (mánaðarliga) |

5) Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk:

| | Byrjanar ár | Kr.. |
|---|---|---|
| Hægsta uppihaldsveiting | 2020 | 18.552 (mánaðarliga) |

| | | |
|---|---|---|
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2018 | 57.804,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 2018 | 31.332,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 2018 | 29.496,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 2018 | 30.540,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 2018 | 27.864,00 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 2014 | 34.080,00 |
| Hjálparviðbót | 2014 | 36.096,00 |
| Røktarviðbót | 2014 | 72.060,00 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 2014 | 33.768,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar | 2020 | 45.000,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fyritíðarpensjónistar | 2014 | 92.900,00 |

2) Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.:

| | Byrjanarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Upphædd | 2014 | 7.608,00 |

3) Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.:

| | Byrjanarár | Kr. |
|---|---|---|
| Barnagjald sbrt.. § 5 | 2014 | 12.996,00 (árliga) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 2014 | 750,91 (eingangsupphædd) | |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 2014 | 1.284,89 (mánaðarliga) | |
| Barnagjald sbrt. § 15, stk. 1 og 2 | 2014 | 12.996,00 (árliga) | |
| Økt barnagjald sbrt. § 15, stk. 3 | 2014 | 25.992,00 (árliga) | |
| Barnaísk oyti sbrt. § 19a | 2015 | 2.500,00 (um ársfj.) “ | |

| | |
|---|---|
| **§ 4**<br><br>Giftur pensjónistur, sum fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hann er fluttur inn.<br>*Stk. 2.* Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi fær varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin er fluttur inn.<br>*Stk. 3.* Giftur pensjónistur, sum hóast liðugt viðgjørdur, framhaldandi er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi og er á visiteraðum bíðilista til | **5.** Í § 4, stk. 1-4 verður “forsorgarlógini” broytt til: “løgtingslóg um almannatrygd og tænastur”. |

| | |
|---|---|
| varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at pensjónisturin verður mettur at vera liðugt viðgjørdur.<br>*Stk. 4.* Pensjónistur, hvørs hjúnafelagi er innskrivaður á sálarsjúkrahúsi hóast liðugt viðgjørdur og er á visiteraðum bíðilista til varandi bútilboð á stovni, góðkendur sambært forsorgarlógini, fær pensjón samsvarandi við stakan pensjónist frá mánaðinum aftaná, at hjúnafelagin verður mettur at vera liðugt viðgjørdur. | |